**Um tvingsilsbøtur**

- Hevur kommunustýrið lógarskyldu til at seta ávíst tiltak í verk ella at lýða boðum frá einum myndugleika, og kommunustýrið tá heldur seg óvirkið, kann landsstýrismaðurin áleggja tvingsilsbøtur.
- Tvingsilsbøtur kunnu bara verða álagdar teimum limunum, ið hava ábyrgdina av, at kommunustýrið heldur seg óvirkið.
- Tvingsilsbøtur kunnu ikki nýtast til at tvinga einstøku limirnar at røkja skyldur sínar, eitt nú skylduna at møta á fundi.
- Tvingsilsbøtur eru eisini ætlaðar til at hjálpa øðrum landsmyndugleika, tá ein kommuna ikki vil lýða boðunum frá viðkomandi myndugleikanum.
- Eftirlitsmyndugleikin má neyvt kunna greiða frá, hvør avgerðin er, sum skal tvingast ígjøgnum á kommunustýrisfundi.